VÁGA KOMMUNA

# Reglugerð

fyri viðgerð og avgreiðslu av umsóknum til kommununa um fíggjarligan stuðul frá feløgum og einstaklingum til mentan og ítrótt

§ 1. Stuðul sambært hesi reglugerð verður latin tvær ferðir árliga. Umsóknir skulu verða kommununi í hendi skrivliga innan 1. mars og 1. september.

§ 2. Kommunan letur ikki stuðul til umsøkjarar, sum ikki hava heimstað ella bústað í kommununi.
Stk. 2. Undantak kann gerast frá ásetingini í stk. 1, um stuðulin í høvuðsheitum verður brúktur í kommununi til endamál, sum koma borgarunum í kommununi til góða.

§ 3. Kommunan letur ikki stuðul til virksemi, sum vinnurekandi standa fyri og sum hevur fíggjarligan vinning fyri eyga.

§ 4. Kommunan letur ikki stuðul til næmingaferðir.

§ 5. Kommunan kann lata rakstrarstuðul til ítróttar- og mentanarfelagsskapir treyta av:
a) At felagsskapurin hevur skipaða limaskráseting og nøktandi felagslóg
b) At felagsskapurin er opin og almennur
c) At felagsskapurin er virkin
d) At felagsskapurin hevur roknskap

§ 6. Kommunan kann lata stuðul til einstøk mentunar- og ítróttartiltøk treyta av:
a) At tiltakið er viðkomandi og mennandi fyri borgararnar í kommununi
b) At tiltakið er alment

Vága kommuna I Hammerhaimbsvegur 1 I 360 Sandavágur I 34 44 00 I vaga@vaga.fo

§ 7. Í sambandi við 100 ára føðingardagar hjá borgarum í kommununi rindar kommunan fyri hølir, reingerð og kaffiborðhald.

§ 8. Umsóknir um stuðul sambært §§ 5-7 skulu latast kommununi skrivliga og skulu á nøktandi hátt lýsa ítøkliga endamálið við stuðlinum. Harafturat skal ein kostnaðarmeting fyriliggja.

§ 9. Borgarstjórin hevur heimild til at avgreiða umsóknir um stuðul sambært hesi reglugerð, tá stuðulsupphæddin ikki fer uppum kr. 2.000,00, tó ikki tá talan er um undantak sambært § 2, stk. 2.

Stk. 2. Mentunar- og trivnaðarnevndin avgreiðir umsóknir um stuðul, tá stuðulsupphæddin er omanfyri kr. 2.000,00 men ikki hægri enn kr. 30.000,00.

Stk. 3. Umsóknir um stuðulsupphæddir omanfyri kr. 30.000,00 men ikki hægri enn kr. 50.000 kunnu játtast av fíggjarnevndini treytað av viðmæli frá mentunar- og trivnaðarnevndini.

Stk. 4. Umsóknir um stuðulsupphæddir omanfyri kr. 50.000 kunnu játtast av býráðnum.

§ 10. Henda reglugerð kemur í gildi, tá hon er samtykt á býráðsfundi. Samtundis fer úr gildi "Reglugerð fyri fyri viðgerð og avgreiðslu av umsóknum til kommununa um fíggjarligan stuðul frá feløgum og einstaklingum til mentan og ítrótt" samtykt á býráðsfundi 23.11.2019.

Samtykt á býráðsfundi 2. mars 2021

Bjarni Prior
*borgarstjóri*

Jóhan Hendrik Ellefsen
*kommunustjóri*